# ítróttur

Nr. 165 • mikudagur • 3. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Besta skotið nakrantíð

**Sjúrður Jacobsen var sum vera man fegin um óvanliga vakra málið, men legði samstundis dent á, at stigini vóru tað týdningarmesta á degnum**

LEIKARAPRÁT
*Jákup Mørk*



Einki var at ivast í, hvør dagsins detalja í dystinum mánakvøldið var.

Við drønandi 3-0 málinum úr 35 metrum fekk Sjúrður Jacobsen eisini hópin av rósum og glósum frá mót- og viðleikarum, eins væl og áskoðarum eftir dystin, og tá vit hittu hann á máli eftir dystin, mátti hann eisini viðganga, at hetta var eitt av teimum heilt góðu skotunum.

– Eg havi nokk ongan tíð rakt bóltin so væl, sum eg gjørdi hesaferð. Hatta var ótrúliga stuttligt at síggja, tá bólturin streyk í málið, tók hann til eftir dystin.

*– Eg havi nokk ongan tíð rakt bóltin so væl, sum eg gjørdi hesaferð, helt Sjúrður um málið, sum ivaleyst er tað besta við Løkin í ár*

Men frá 35 metrum. Er tað nakar, sum hugsar um at skjóta mál so langt útifrá?

– Tað hendir jú viðhvørt. Bólturin lág væl fyri, so eg royndi bara. Onkur sigur kanska, at tað var heppið, men hepnið skal jú eisini uppsøkjast, tók hann flennandi til.

### Mugu bara royna

Men líka mikið hvussu var og ikki við málinum, so helt Sjúrður tó eftir dystin, at tað vóru tey trý stigini, sum høvdu størsta týdningin fyri liðið.

– Tað er so einki at ivast í. Tað var tað, sum vit fóru eftir, og við hesum eru vit aftur við í oddinum. Har hava vit dyst á Toftum komandi umfarið, og tá fara vit so aftur eftir stigum. B68 er kanska eisini tað liðið, sum koyrir best í løtuni, so tað er einki at ivast í, at tað verður ein trupul uppgáva, men vit fara so eftir trimum stigum. Tað var heldur ikki nøkur løtt uppgáva hesaferð, tí EB/Streymur royndi alla tíðina, í øllum førum til 3-0 málið, men tað gekk so hesaferð. Og tað er so tað, sum vit mugu royna at gera hvørja ferð, tað sum eftir er av kappingini, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, segði fegni málskjúttin at enda, áðrenn børnini við girðingina aftur sluppu at spyrja um, hvussu hann bar seg at við hasum skotinum.

# Julian er nú næstfremst

**Eftir ÍA sigur á Fylkir var tað mánakvøldið greitt, at KR er meistari longu tvey umfør undan kappingarenda**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Íslendska landskappingin heldur frí næsta vikuskifti. Tá skulu íslendingar spæla mest spennandi landsdystin nakrantíð. Týskland vitjar á Laugardalsvøllinum, og um Ísland fer at vinna, so hava teir heilt góðar møguleikar at sleppa við í EM endaspælið í Portugal næsta summar.

Tvey tey næstu vikuskiftini verður endaspurturin í landskappingini. Men longu mánakvøldið varð greitt, at eingin spenningur er eftir um, hvør skal verða meistari. Julian Johnsson og liðfelagarnir í ÍA vóru á Árbæjarvøllinum í Reykjavík, har teir vunnu 1–0 ímóti Fylkir. Fylkir var einasta felagið, sum framvegis hevði møguleika at røkka KR. Tá ið Fylkir tapti var greitt, at KR, sum sama kvøld hevði vunnið 3–1 í Grindavík, var meistari. Teir hava 33 stig, meðan ÍA og Fylkir hava 26 stig.

Hetta var annað árið á rað, at ÍA við at spæla kappingarneytanum hjá KR eitt puss var orsøkin til, at KR vann meistaraheitið undan kappingarenda. Hetta spældu teir eitt sindur upp á í íslendsku pressuni í gjár, tí ÍA og KR eru gamlir kappingarneytar, og uppgerðirnar millum stóra felagið í vesturbýnum í Reykjavík og Akranes hava í mong ár havt serligan dám yvir sær.

KR hevur vunnið meistaraheitið 24 ferðir. Teir eru í hálvfinaluni í steypakappingini, og teir ætla sær at vinna báðar kappingarnar. Í steypakappingini er ÍA millum kappingarneytarnar.

### Bara undanvindur

Fyri einum lítlum mánað síðani ella 10. august vóru teir á Akranesi á 8. plássinum og harvið heilt tætt at niðurflytingarplássunum. Síðani tá hevur gingið sum eftir ánni. ÍA hevur vunnið fýra sigrar upp í slag.

Mánakvøldið var tað tætt og spennandi á útivølli ímóti Fylkiri. Tað var fitt av vindi, og tað regnaði. ÍA hevði undanvind í fyrra umfarinum, og tað var málleyst inntil fýra minuttir vóru eftir. So skoraði Kári Steinn Reynisson fyri ÍA við fínum skoti upp í málhornið. Harvið var KR meistari, og harvið var eisini greitt, at ÍA hevði lyft seg úr fjórða og fram á næstfremsta plássið, samstundis sum teir høvdu trýst Fylkir niður á triðja plássið. Bæði liðini hava 26 stig. ÍA hevur málmunin +5, og Fylkir hevur málmunin +2.

Um dystin mánakvøldið verður sagt, at hann ikki var serliga væl spældur, at málverjarnir og miðverjarnir stóðu seg væl, og at tað mesta snúði seg um stríð á miðvøllinum. Tað plagar at vera matur fyri Julian Johnsson.

Í tveimum teimum seinastu umførunum tykist tað sum um, at avbjóðingarnar hjá ÍA eru eitt sindur torførari, enn tær eru hjá Fylkiri, men eitt er, hvat støðutalvansigur, og eitt annað er, hvussu nógv mótstøðuliðini fara at kenna seg kroyst at leggja fyri.

ÍA skal spæla á heimavølli ímóti Grindavík, sum er mitt í røðini og á útivølli í Vestmannaoyggjunum, meðan Fylkir skal spæla á útivølli á Akureyri ímóti illa sperda KA og á heimavølli ímóti Vali, sum eisini er heilt illa spert. Hjá ÍA ræður um at vinna, og soleiðis sum gongdin hevur verið síðsta mánaðin, so skuldi einki verið í vegin fyri, at Akranes fer at fáa fulla úrtøku, og at teir harvið hava góðar møguleikar at vinna silvurkrónurnar.

### Íslendska Landsbankadeildin

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KR | 16 | 10 | - | 3 | - | 3 | 28 | 18 | 10 | 33 |
| **2** | **ÍA** | **16** | **7** | - | **5** | - | **4** | **24** | **19** | **5** | **26** |
| 3 | Fylkir | 16 | 8 | - | 2 | - | 6 | 22 | 20 | 2 | 26 |
| 4 | FH | 16 | 7 | - | 3 | - | 6 | 26 | 24 | 2 | 24 |
| 5 | Þróttur | 16 | 7 | - | 1 | - | 8 | 27 | 25 | 2 | 22 |
| 6 | Grindavík | 16 | 7 | - | 1 | - | 8 | 22 | 28 | -6 | 22 |
| 7 | ÍBV | 16 | 6 | - | 2 | - | 8 | 22 | 24 | -2 | 20 |
| 8 | Fram | 16 | 6 | - | 2 | - | 8 | 21 | 28 | -7 | 20 |
| 9 | KA | 16 | 5 | - | 3 | - | 8 | 26 | 25 | 1 | 18 |
| 10 | Valur | 16 | 5 | - | 2 | - | 9 | 20 | 27 | -7 | 17 |

**Føroyskir leikarar:** Julian Johnsson (ÍA)



NSÍ-EB/Streymur 3-0 (1-0):

# NSÍ reistist




*Har var nógv ferð á, tá EB/Streymur vitjaði NSÍ mánakvøldið, men tá alt kom til alt, vóru tað heimamennninir, sum drógu longra stráðið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í einum lívligum dysti fingu runavíkingar vaskað stórtapið fyri Lyn av sær, og hildu teir sostatt fast í jagstranini eftir oddaliðunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fyrsta europeiska ævintýrið hjá Runavík endaði við brestin, tá teir fyrr í vikuni vóru fyri einum syngjandi 6-0 tapi í útidystinum móti norska Lyn.

Tí var setningurin fyrst og fremst at reisa seg sálarliga, nú EB/Streymur kom á vitjan. Ein dystur, sum fyri NSÍ hevði alstóran týdning, um fylgjast skuldi við hinum oddaliðunum, sum leiktu sunnudagin.

Fyri EB/Streym hevði dysturin ikki minni týdning. Liðið hevur staðið seg væl í ár, og um talan kundi gerast um stig við Løkin, mundu fólk av álvara fara at tosa um møguleikan fyri europeiskum fótbólti. Prát, sum annars man hava verið veruleikafjart tey árini, sum felagsliðið higartil hevur verið í bestu deildini.

### Lívligt við góðari ferð

Og tað var ein sannroynd, at báðir partar løgdu nógv fyri mánakvøldið. Ferðin varð alt fyri eitt sett hampuliga høgt, og tá bæði liðini royndu at breiða spælið út á vengurnar, soleiðis at sleppast kundi inn um fløtu verjurnar, gjørdist talan um rættiliga lívligt undirhald, har spælið hevði hug at ferðast aftur og fram.

Tað var tó heimaliðið, sum hevði størra trýstið á ketlunum hesa fyrstu løtuna. Serliga lá væl fyri hjá kvika Jónstein Petersen at renna seg inn um verjuna, og møguleikar spurdust eisini burturúr. Helgi L. Petersen og Karsten From høvdu eisini havt onkrar av hesum í part, tá tað um miðjan hálvleikin eydnaðist Helga at fáa bóltin í kassan. Uppspælið kom í vinstru, haðani Jónstein seindi innfyri. Ian Højgaard var fyrstur á harða innlegginum, og tá bólturin so brast í stólpan, kundi Helgi gera seinasta arbeiðið.

Hetta gav kanska runavíkingunum betri frið yvir spælið, og eina løtu tóktist eisini, sum um EB/Streymur fánaði nakað. Men bert eina løtu.

### Dreymamál avgjørdi

Seinasta løtan av fyrra hálvleiki og at kalla allur seinni hálvleikur vóru nevnliga sera undirhaldandi. EB/Streymur hevði ongan hug at geva skarvin yvir. Heldur ikki eftir at Karsten From við sínum fyrsta málið fyri NSÍ hevði økt til 2-0 eftir horna. Eitt mál, sum annars varð feirað við manér, tá Karsten fyrst takkaði liðfeløgunum og síðani áskoðarunum.

Kanska átti hetta málið eisini at punktera gestirnar, men tað gjørdi tað ikki. NSÍ tók seg kanska eisini eitt vet aftur á vøllin, og so trýsti EB/Streymur. Møguleikarnir komu eisini, men hvørki Egil á Bø ella Marni Djurhuus fingu sett høvdið nóg væl á, tá teir í tveimum førum komu at standa væl fyri. Og so mundi tað eisini hjálpa væl hjá NSÍ, at Sorin Anghel ikki fekk verið við hjá EB/Streymi. Ikki tí at spælið út á vengurnar var nakað vánaligt hugskot, men til tíðir tóktist hetta nakað einstáttað, soleiðis at Óli Hansen og co. aloftast vóru hægstir, tá bóltarnir vórðu sendir inn.

Sum tíðin leið, so bendi alt eisini tann vegin, at NSÍ skuldi megna at ríða stormin av. Sjálvir høvdu heimamenninir eisini nøkur vandamikil kontra, tá EB/Streymur flutti alt meira fólk niðan, men tað var so ikki úr hesum, at seinasti seymurin varð settur í kistuna.

Uppspælið var av teimum meira róligu, og eingin mundi sum so gruna nakað, tá Sjúrður Jacobsen fekk bóltin. Staddur einar 35 metrar úti frá málinum gjørdi bakkurin tó ikki mætari enn at langa til, og so kundi gestirnir bara hyggja at, meðan bólturin streyk beina leið upp ímóti horninum, uttan at Gunnar á Steig hevði nakran møguleika at røkka honum. Eitt satt dreymamál, sum eisini fekk guliganz á bakkanum at syngja um, at tað bert er ein Sjúrður Jacobsen. At tað so sambært telefonbókini á netinum eru í minsta lagi fimm, var tó ikki nakað, sum teir mundu leggja stórvegis í. Á vøllinum var bert hin eini, og mál hansara hesaferð er heldur ikki eitt slíkt, sum tað koma serliga nógv av.

### Gera sjálvir av

Og við sigrinum hevur NSÍ altso togað seg uppaftur í oddin. Teir hava framvegis møguleikan at gera seg galdandi í gullstríðnum, og fyri tað nógva kunnu teir eisini sjálvir gera av, hvussu langt teir skulu røkka. Ikki minst í teimum báðum komandi dystunum. Tá skulu teir fyrst á vitjan á Svangaskarði, fyri síðani at taka ímóti B36, og verður talan um stig her, so er nógv, sum bendir á, at teir í øllum førum skulu endurtaka silvurmerkini frá seinasta kappingarárið.

Hjá EB/Streymi var tapið hinvegin helst eitt beinleiðis farvæl til møguleikan at blanda seg heilt uppi í toppinum. Tað munnu tó vera fá, sum eru beinleiðis ónøgd um hetta, tí liðið hevur longu nú staðið seg betur enn nakrantíð áður. Og á pappírinum tykist møguleikin eisini vera, at liðið kann klintra í øllum førum nakað upp. Komandi umfarið taka teir ímóti oddaliðnum úr HB, og so eru dystir móti trimum liðum, sum øll eru stødd niðanfyri EB/Streym á talvuni. So hóast eitt farvæl til Europa, so bendir alt á metár kortini, og tað man nú heldur ikki vera so galið.

**Dysturin í tølum**
**NSÍ-EB/Str. 3-0 (1-0)**
**1-0:** Helgi L. Petersen, 23
**2-0:** Karsten From, 50
**3-0:** Sjúrður Jacobsen, 81
**Dómari:** Birgir Sondum
*Hevði gott tamarhald á, og royndi ofta at samskifta við leikararnar við orðum, heldur enn kortum.*

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Pereira, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard (Jústinus R. Hansen, 25), Kári Hansen, Ian Højgaard (Rúni Rasmussen, 64), Jónstein Petersen – Karsten From (Sonni L. Petersen, 80), Helgi L. Petersen

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Gert Hansen, Andrzej Pacek, Egil á Bø, Bárður Olsen – Marni Djuhuus, Marek Wierzbicki, Ronnie Samuelsen, Jákup Martin Joensen (Esmar Eiðisgarð, 76) – Hans Pauli Samuelsen (Ingi Hansen, 46 (Teitur Joensen, 65)), Magni á Lakjuni